HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur, 9. mars 2017 kl. 16:30

Á fundinum vóru: Jeanette Blaasvær, Malan Mikkelsen, Petur Mittún, Bjørghild Djurhuus, Bogi Andreasen og Manne Persson

Skrivari: Hans Jón Thomsen

Skrá

Tvey skjøl eru send skúlastýrinum til hoyringar:

- Uppskot um vegleiðing um uppgávur hjá skúlastýrinum í fólkaskúlum í Tórshavnar kommunu.

  Hoyringsfreist: 6. mars 2017

  Várt varð fram, at vegleiðingin er ógvuliga detaljera og er í stóran mun ein endurtøka av eini lóg. Ynskiligt hevði verið, um uppgávan hjá kommunustýrislimunum eisini varð nágreinað í vegleiðingini.
- KT – strategi og atgerðarætlan – Fólkaskúlarnir í Tórshavnar kommunu.

  Hoyringsfreist 27. mars 2017

  Ongar viðmerkingar vóru frá skúlastýrinum í Hoyvíkar skúla. Várt varð tó fram, at tað er gott, at Tórshavnar kommuna leggur eina KT-strategi og atgerðarætlan.

Eitt skjal er sent skúlastýrinum til ummælis:

- Tórshavnar kommuna hevur gjørt eitt uppskot til skabelón, ið kann nýtast til fundarskrá og fundarfrágreiðingar.

  Skúlastýrið í Hoyvíkar skúla tekur undir við at brúka uppskotið til fundarskrá og fundarfrágreiðingar.

Eitt skjal er sent skúlastýrinum til kunningar:

- Leiðreglur fyri skúla og frítíðarskúla, ið húsast/ikki húsast í sama bygningi.

  Leiðreglurnar eru samtyktar á fundi í Mentamálanevndini í Tórshavnar kommunu 13. februar 2017.

Hegnið rundan um sparkivøllin í skúlagarðinum:

Skúlastýrið í Hoyvíkar skúla hevur sett sær fyri at gera ábøtur á hegnið rundan um sparkivøllin í skúlagarðinum. Í núverandi løtu er hegnið í sera ringum standi, og tað er í ávísan mun vandamikið hjá børnum at spæla/sparka á vøllinum.

Frítíðarskúlin í Hoyvík og Hoyvíkar skúli hava gjørt vart við trupulleikan í skrivi til Tórshavnar kommunu, dagfest tann 2. november 2016.

Sjálvt um vit bæði hava sent skrivligar og munnligar fyrispurningar til Tórshavnar kommunu hesum viðvíkjandi, so er einki hent í málinum.

Avrátt varð, at skúlastýrislimur setur seg í samband við Húsaumsitingina og finnur útav, nær málið verður avgreitt. Um onki hendir í málinum í nærmastu framtíð, so skipar skúlastýrið fyri, at hegnið verður tikið niður fyri at tryggja, at trygdin á sparkivøllinum verður í lagi.

Trivnaðarkanning millum foreldur, ið varða av børnum í Hoyvíkar skúla:

Fyrispurningur er sendur Gallup Føroyar í sambandi við, at skúlastýrið í Hoyvíkar skúla kundi hugsað sær at gjørt eina trivnaðarkanning millum foreldur, ið varða av næmingum í Hoyvíkar skúla.

Avrátt varð, at skúlastjórin í fyrstu atløgu skuldi seta seg í samband við Tórshavnar kommunu og finna útav, um Tórshavnar kommuna hevur í hyggju at gera eina trivnaðarkanning millum foreldur í øllum skúlum í Tórshavnar kommunu, ið fyrr hevur verið havt á máli.

Ætlaða høvuðsumvælingin av Hoyvíkar skúla:

Høvuðsumvælingin av Hoyvíkar skúla skúla hevur verið ávegis í fleiri ár. Hvørt ár er peningur ikki settur av til endamálið, og nú vil skúlastýrið hava greiðu á, hvørja ætlanir sitandi býráðssamgonga hevur við Hoyvíkar skúla. Avrátt varð, at forkvinnan í skúlastýrinum setir seg í samband við Tórshavnar kommunu og fær í lag ein fund við Anniku Olsen, borgarstjóra, og Gunnvør Balle, forkvinnu í Mentamálanevndini.

Fundurin lokin kl. 18:45